


# Havgrímur Johannessen • sjálvsstøðugur
## aldur - er bara eitt tal.... men eg eri 27 ár

Lýs teg sjálvan við trimum orðum:
Pengar, fyrstur, smartast.

Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?
Tað er helst HA? Hoyri so ikki so væl, tað er allarhelst av øllum tí harða tónleikinum, sum larmar rundanum meg dag og dagliga. Og sjálvandi eri eg for tjekkaðuir, ella rættari sagt, býttur at brúka oyraproppar.

Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?
Alt, kvinnan er jú tann størsti dýrgripur og flottasta listaverk, vit eiga.

Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?
Úr einum korteri og uppeftir, alt eftir hvat eg skal.

Hvat stressar teg?
Alt tað, sum eg ikki geri, og innast inni veit, at eingin ger fyri meg.

Hvat gleðir teg?
Sonurin, og at starvsfólk gera uppgávur uttan at verða biðin um tað.

Nær feldi tú seinast eitt tár?
Tá tann fittasti og vandaligasti persónurin, eg havi kent, fór til gravar fyrr í ár, fastir mín, Marita Weihe.

Nær smakkaði tú tær seinast á?
Fríggjakvøldið og annars alt for ofta (tað er ein arbeiðsskaði).

Hvat var seinasta ynskið, sum tú fekst uppfylt?
Tað veit Gud, eg veit ikki, tað er bara tekin um, at eg havi tað nógv for gott.

Hvørji ráð hevur tú til fólk, sum ætla sær at lata upp eitt dansistað?
Tað fari eg at halda fyri meg sjálvanJ

Hvar arbeiðir tú?
Í dag nýtist einum ikki at hava eina skrivstovu. Eg arbeiði meir ella minni altíð, bara eg havi mína fartelefon, og ongantíð betur um eg havi eina farteldu við tráðleysum internetið eisini, tó eingin treyt.

Hvat er besta uppfinningin og hví?
Fartelefonin, hon er meir ella minni sum konufólkini, kann illa liva við teimun, men slett ikki uttan.

Hvat hevur tú í lummunum beint nú?
Fartelefonina.

Hvat er títt besta heimaráð?
Ver í góðum lag, sjálvt tá tú ikki hevur hug. Tí tað gagnar tær sjálvum best, og tað besta við tí er, at tað kostar einki.

Hvør er stuttligast í Føroyum og hví?
Eg kenni so nógv stuttlig fólk, at eg fái ikki valt nakran ávísan burturúr. Tey eru stuttlig, tí eg havi tað gott saman við teimum.

Hvør er keðiligast í Føroyum og hví?
Lat meg ikki vera so keðiligan at nevna hann her, men hann keðir meg.

Hvussu ofta speglar tú tær?
Uttan iva nógv for ofta.

Hvussu ofta ert tú hjá frisør?
3 ferðir um vikuna.

Hvør er tín løgnasta uppliving sum fyriskipari ella dansitaðseigari?
Eri ikki stoltur av tí, men tað var á Tvøroyri í 1999. Vit høvdu fingið ensku útgávuna at Chippendales, Dreamboys til Føroya, havi ikki sæð so vill konufólk nakrantíð fyrr. Ja, tann elsti áskoðarin mundi vera ein 70 ára gomul omma. Gott at tað ikki var omma mín. Men tann løtan var stuttlig.